# TAÐ HENDIR ...

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



## HVUSSU BEATLES FINGU KREML AT RIDLA

Í hesi BBC dokumentar sendingini verður feritt frá, hvussu poppdreingirnir í The Beatles ávirkaðu eitt heilt ættarlið í Sovjetsamveldinum, hóast teirra tónleikur var bannaður har. Varaforsetisráðharrin í Russlandi greiðir frá, hvussu hann lærdi seg enskt við at lurta eftir smugladum Beatles-plátum.

**HVUSSU THE BEATLES FINGU KREML AT RIDLA**
SvF
leyagrkvøldið 6/3 kl. 21.40



## ÆVINTÝRFILMUR

Leikstjórin Tim Burton smæðist ikki við at brúka litir og lív, tá ið hann ger sínar ævintýrfilmar. Nú hevur hann gjørt eina nýggja útgávu av klassisku søguni um Alice in Wonderland, og í enn einum filmi hevur Tim Burton sent boð eftir Johnny Depp til ein høvuðsleiklut.

**ALICE I EVENTYRLAND**
Havnar Bio
Frá hósdegnum 4/3



## KAPPINGIN HARÐNAR

Anna Nygaard er framvegis ein av teimum, sum kappast í X Factor. Higartil hevur hon ikki verið í vanda fyri at fara úr kappingini, men so hvørt sum fleiri rúka, harðnar eisini kappingin millum tey bestu, sum eftir eru. Remee hevur framvegis øll síni trý fólk eftir í kappingini, men spurningurin er, nær ein av hansara sangarum rýkur.

**X FACTOR**
DR1
fríggjakvøldið 5/3
kl. 19.00



## URIAH HEEP KVØLD Á TVØROYRI

Deiggj hava seinastu árini verði á konsertferð í Spania og Finnlandi í samband við sokallað Heepvention tiltøk, sum verða tilrættisløgd av Uriah Heep fjepparum. Farna vikuskifti fylti Deiggj Havnar Klubba til Uriah Heep kvøld, og hetta vikuskiftið stendur Seglloftið á Tvøroyri á skránni.

**URIAH HEEP KVØLD VIÐ DEIGGJ**
Seglloftið á Tvøroyri
Leygarkvøldið 6/3

## FORELDUR LEITA EFTIR BÚSTAÐI

Burt og Verona eru farin um tey 30, hava hildið saman í nógv ár og skulu nú verða foreldur. Tey fara á ferð í USA fyri at finna tann fullkomna bústaðin til teirra nýggju familju. Men alt gongur ikki soleiðis, sum tey kundu hugsa sær.

**AWAY WE GO**
dvd-filmur
10/3



## REBELLURIN SKRIVAR

Arbeiðaradrongurin, listamaðurin og provokatørurin Erik Clausen greiðir í hesi bók frá ymiskum, hann hevur upplivað í sínum lívi. Clausen vaks upp í Sydhavnen í Keypmannahavn. Mamman var støk, og pengarnir vóru ikki teir nógvu. Men undir hesum umstøðum var neyðugt við samanhaldi og solidariteti, og tað hevur merkt Erik Clausen síðani.

**CLAUSEN**
Lindhardt og Ringhof



## TRILLA Í VÁGARNAR

Leygardagin er ókeypis at koyra ígjøgnum Vágatunnilin, og tá plaga vágafólk at spíla seg út við tiltøkum og tilboðum. Og tey, sum vanliga ikki koyra ígjøgnum undirsjóvartunlarnar, kunnu gera sær ein túr í Vágarnar, har tað ber til at fara til handils, á hotell at eta ella kanska vitja Krígssavnið.

**VÁGATUNNILIN ÓKEYPIS**
Leygardagin 6/3 06.00 til sunnudagin 7/3 06.00